# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Politikkur er at vilja – og tora broytingar

– Vit skulu spara óneyðugar dupultfunktiónir á teimum trimum sjúkrahúsunum, segði Aksel V. Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum við Sosialin í gjár. Og hann legði dent á, at har eru óneyðugar dupultfunktiónir á sjúkrahúsunum.

Hetta sigur landsstýrismaðurin, hóast stjórarnir á teimum báðum sjúkrahúsunum á Tvøroyri og í Klaksvík ikki skilja, hvat landsstýrismaðurin meinar við, tá hann tosar um rationaliseringar. Teir tosa sum um landsstýrismaðurin ætlar at spara burtur tvær stjóralønir, og halda tað muna lítið, tá leitað verður eftir 800 milliónum krónum.

Men tað er einki at ivast í, at nógvar dupultfunktiónir eru á teimum trimum sjúkrahúsunum. Tað er gott, at landsstýrismaðurin í heilsumálum eisini dugir at síggja hetta, tí teir eru so nógvir undan honum, sum ikki hava sæð hendan trupulleikan – og um teir hava sæð hann, so venda teir tí aloftast til tað, at funktiónir skulu flytast av Landssjúkrahúsinum og út á smáu sjúkrahúsini – ein hugburður, sum ikki tykist serliga rationellur.

Tey trý sjúkrahúsini í Føroyum hava sína serliga søgu og sín serliga uppruna. Men tað er ikki vist, at tørvurin er tann sami í dag sum hann var fyri 100 árum síðani, tá vit ikki kundu koyra gjøgnum fjøll og undir firðir.

Tí er tað gott, um vit hava ein heilsumálaráðharra, sum torir at taka avgerðir. Tað kann ikki verða rætt, at sjúkrahúsverkið skal brúkast sum kastibløka í einum lokalpolitiskum leiki, soleiðis sum tað hevur verið nú í so mong ár.

Og tað er ikki bara á heilsuøkinum, vit hava hendan trupulleikan. Vit hava so nógvar dupultfunktiónir. Tað hevur ofta størri týdning at spjaða stovnar sundur, hóast teir verða nógv dýrari at reka. Tá brúka vit óneyðugar skattapengar upp á at halda lív í nøkrum arbeiðsplássum, heldur enn fólk á skilagóðum vinnuligum grundarlag kunnu skapa arbeiðspláss, sum geva pengar til landskassan.

Og tað er nú heldur ikki bara á bygd, at slík eljustríð eru. Takið bara høpisleysa skúlastríðið í Havn, har Tórshavnar Býráð og Tórshavnar Kommunuskúli liggja í opnum kríggi um 10. flokk – har advokatar og fútabann verða brúkt í stríðnum fyri at skapa ein skúla við 10. flokki í Havn.

Politikkurin er at vilja - og tora broytingar. Og tað eru sanniliga broytingum, vit hava brúk fyri, um vælferðarsamfelagið skal hóra undan, nú so hart leikar á búskapin.

**Sosialurin**

## Ábyrgd - eisini fyri øðrum



**KATRIN HOVLAND PETERSEN**
Ungmannafelagið Samband

Unga Tjóðveldi hevur tikið sær tykni av, at undirritaða á landsfundi Sambandsfloksins førdi fram at vit ungu eru politiskt líkasæl og ábyrgdarleys - vit kunnu ikki loyva okkum bert at hugsa um okkum sjálvi, men mugu eisini taka atlit til okkara eldru og okkara eftirkomarar.

Fyrst og fremst má staðfestast, at tær hugleiðingar, sum eg førdi fram á landsfundi Sambandsfloksins als ikki eru nýggjar hugsanir - sjálvandi eru vit ungu líkasæl og ábyrgdarleys! Hví eru vit líkasæl, hvat viðvíkur politikki? Tí vit hava annað at hugsa um! Hví eru vit ábyrgdarleys? Tí vit hava ikki ábyrgd av øðrum enn okkum sjálvum! I'm just stating the obvious.

So tá Unga Tjóðveldi kemur við tí niðurstøðu, at eg skuldi hildið meg verið meira umhugsin enn onnur ung, er hetta púra burturvið – lesur mann tekstin eitt sindur meira nágreiniligt, vildi ein eisini sæð, at eg sigi »vit ungu«.

So haldið høvdið kalt og leypið ikki framav við niðurstøðum, ið einki hald hava í veruleikanum.

Tað hevði frøtt meg, um vit hinvegin kundu fokuserað upp á tað týdningarmikla í tekstinum.

Eg standi fast við mína útsøgn um, at ábyrgdarloysi í ungdóminum m.a. sæst í tí, at so nógv ung eru tjóðveldissinnaði. Eg trúgvi virkuliga, at tað eru nógv ung, sum meina tað allarbesta við at vera tjóðveldissinnað – tey fylgja hjartanum og einari sera týdningarmiklari ábyrgdarkenslu – hetta er sama ábyrgdarkenslan, sum sigur teimum, at tey ikki skulu snulta upp á foreldur síni alt lívið. Ein heilt ígjøgnum góður hugburður til lívið - og eg havi sera stóra virðing fyri teimum, sum klára at útliva hendan hugburð.

Men eg ræðist, tá mann førir hendan hugburð yvir á eitt heilt samfelag – eitt, let's face the facts, sera lítið samfelag. Mann má duga at síggja mun á tí, sum er galdandi fyri ein sjálvan (einstaklingin) og á tí, sum er galdandi fyri eitt samfelag!

Tá ein einstaklingur tekur hendan sjálvstøðuga hugburð á seg, er tað bert einstaklingurin, sum førir vansarnir av hugburðinum.

Men velja teir ráðandi í einum landi hendan hugburð fyri alt samfelagið, so er tað ikki bert ein sjálvur, sum merkir vansarnir av hugburðinum: ØLL merkja teir – børnini, tey ungu, barnafamiljurnar, tey gomlu, tey veiku og tey sjúku.

Fyri okkum ungu bilar tað ikki - vit rýma bara av landinum so skjótt, sum tað ikki er gott at búgva her meira! Tað er altíð tann framleiðandi, skapandi parturin, ið fer fyrst, tá tað gongur niður á bakka í einum samfelagi.

Tí er tað so eviga lætt hjá okkum at rópa »tjóðveldi, tjóveldi!« – men ábyrgdarfult, tað er tað ikki.

So tá Unga Tjóðveldi heldur, at sambandsungdómur ikki hevur dirvi at ganga frameftir, so má eg staðfesta, at tað er fullkomiliga misskilt: tað handlar ikki um dirvi, men um ábyrgd – eisini ábyrgd fyri øðrum enn mær sjálvum!

## Hvat fólk rekur sínar ungu úrmælingar undir annað flagg?



**PÁLL Á REYNATÚGVU**

**Øll kenna vit ungdómsins teytaleysa dirvi og avbjóðandi lyndi. Eingi akker, ið binda til botns. Høgt er til loftið, og vítt til veggja. Kósin er sett beint fram og ongin tørvur er á at líta í bakspeglið. Júst soleiðis sum ungdómur eigur at hugsa, ella »ikki« at hugsa. Bert liva sítt lívsins summar.**

Summi eru, og gerast úrmælingar á sínum øki. Heimurin fyrir tær opin, sum Martin Joensen, so væl yrkir í undurføgru yrkingini »Morgun«. Dreymurin um at teljast millum tey allarbestu.

Standandi við gyltasta heiðursmerkinum um hálsin. Brennandi kenslu í barmi, tá sigrandi flaggið verður vundið á stong, sveimandi oman fyri kappingarneytarnar. Tá rennur saman millum jørðildi og ský. Tá rennur saman millum farið og komandi. Tá rennur saman millum einstaklingin og heildina.

Havi sjálvur kent ívnu hárrøturnar bretta sær á, tá oyggjaleikagullið dukaði um kapp við ovurstolta unglingahjarta mítt, og Merkið varð vundið á stong. Reinasta kenslan av at vera, vera og vera.

Tað er einki minni enn framúrskarandi, tá oyggjaleikirnir eru ein ov lak avbjóðing fyri okkara føroyska ungdóm. Sum tá Pál Joensen bjóðar heiminum av við síni frágera góðu samanrenning av evnum og vilja, sum svimjari.

Men eins ljóst og vónbjart hválvið er fyri svimjaran Pál Joensen, eins mjørkakent er tað fyri føroyingin Pál Joensen, og øll tey sum kunnu hugsast at royna leið hansara.

Tí enn sum áður, er støðan tann sama. Vit reka okkara ungu úrmælingar undir annað flagg, um tey rættiliga skulu bjóða heiminum av.

»Kongeriget Danmark, for så vidt angående Færøerne« og Dannebrog í húnarhátt, um Pál Joensen gerst OL-vinnari. Hettar er støðan sum vit Føroyingar bjóða tær Pál, og teimum í tínum kjalarvørri.

Orð eru óneyðug at lýsa eina slíka vanærandi støðu. Tað er rætt av tær at gera tað, sum er neyðugt fyri at fylgja dreyminum heilt til himmalsins ítróttardyr. Tú átti ikki at verið drigin í samleikadíkið, hóast kvølin uttan iva hevur verið stór.

Skommin er okkara! Vil fegin biðja um umbering fyri, at eg hóast stóra ávirkan gjøgnum mong ár, ikki havi megnað at vunnið tær og tínum líkum, betri kor og størri virðing, millum aðrar tjóðir.

Blíðan byr, Pál! Sum føroyingur eri eg stoltur av tær og tínum gávum.

Vónin er, at tú og tínir líkar, um tað er innan tónleik, ítrótt ella sjónleik, veita okkum ta sjálvsvirðing, sum føroyska tjóðin fekk í vøggugávu, men sum hon enn velur at køva.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Jaspur Langgaard jaspur@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.